LM-099/2023

UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ

Fylgiskjal 83

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Tinganes
Postrúm 64
110 Tórshavn

Tórshavn, 23. januar 2024
J.nr.: 24/02183-2

Viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu
Umhvørvismálaráðið takkar fyri høvið at gera viðmerkingar til uppskotið til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu og fegnast um, at viðurskiftini loksins verða skipað við lóg.

Umhvørvismálaráðið skal fyrst vísa á, at náttúruatgongd og ferðsla í náttúruni í øllum okkara grannalondum verða regulerað sum náttúrumál undir ábyrgdarøkinum hjá náttúrumyndugleikanum. Tá ið náttúruatgongd verður regulerað sum náttúrumál, hava varðveitsla og vernd av náttúruumhvørvi, lívmargfeldi og vistskipanum fremstu raðfesting, og lóggávan skal fyrst og fremst tryggja, at náttúruatgongdin ikki skaðar viðbreknar vistskipanir ella hóttir dýra- og plantulívið. Umhvørvismálaráðið mælir til at hava hetta í huga, nú ið hesi viðurskiftini verða regulerað í ferðavinnulóggávu. Hetta so at dentur verður lagdur á at leggja upp fyri vistfrøðiligari burðardygd.

Umhvørvismálaráðið skal vísa á, at fyri náttúruverndina er góð og javnbjóðis náttúruatgongd hjá almenninginum eitt týðandi virði í sær sjálvum. Náttúruvernd og náttúruatgongd hanga í stóran mun saman, tí atgongdin at uppliva náttúruna fremur fatan og virðing fyri náttúruni. Tá ið almenningurin fær beinleiðis samband við náttúruna, t.d. við at ganga í náttúruni og eygleiða náttúrumargfeldið, elur tað umsorgan fyri náttúruni og viljan at verja hana. Eftirspurningurin hjá almenninginum eftir náttúruatgongd ávirkar eisini politikk og avgerðartilgongdir hjá politiska myndugleikanum. At almenningurin virðismetir atgongd at náttúruøkjum, kann í sær sjálvum eggja politisku skipanini til at taka neyðug stig til at verja viðbreknar vistskipanir. At náttúran er atkomandi, er samanumtikið ein partur av legitimitetinum undir náttúruvernd sum samfelagsáhugamáli. Umhvørvismálaráðið mælir tí til at staðfesta hetta í endamálsásetingini í lógaruppskotinum, so at fyrilitið fyri javnbjóðis náttúruatgongd verður partur av metingum og avgerðum eftir lógini, og so at inntriv í náttúruatgongdina altíð skulu byggja á neyvt tilskilað og týðandi fyrilit og ongantíð skulu vera víðfevndari, enn fyrilitini ítøkiliga krevja.

Hetta er eisini í samsvari við norðurlendska náttúrufatan, sum er sprottin úr tí tætta sambandinum, sum norðurlendingar, eisini føroyingar, søguliga hava havt við náttúruna. Náttúran er ein kelda til íblástur, ró og vælveru, sum norðurlendingar hava sera stóra virðing fyri og vilja verja og varðveita. Ein týðandi liður í norðurlendskari náttúrufatan er meginreglan um rættin hjá øllum til javnbjóðis

náttúruatgongd. Í øllum Norðurlondum gevur henda meginreglan í útgangsstøðinum einstaklingum rætt at ferðast frítt og vera í náttúruni, bara fyrilit verður havt fyri náttúruni og øðrum virksemi. Henda náttúrufatanin, sum er ein samrunnin partur av norðurlendskari mentan, lívi og samleika, er ikki bara høgt í metum hjá norðurlendingum sjálvum, men eisini hjá vitjandi. Tann fría náttúruatgongdin uttan nakran mismun – heldur ikki vegna tjóðskap ella bústað – og virðingin fyri náttúruni eru felags norðurlendsk virðir, sum Norðurlond sum náttúruferðamál eru víðagitin fyri.

Fyri náttúruverndina er umráðandi, at lógaruppskotið ger greitt, at náttúran ikki skal kunna gerast til søluvøru, so at fagurvirðið og upplivingarvirðið í náttúruni kunnu verða kapitaliserað. Tá ið farið verður við náttúruni sum søluvøru, elvir tað skjótt til, at serliga dragandi náttúruøkir verða ovurtroytt uttan fyrilit fyri vistfrøðiligari burðardygd, og at skaðilig og skemmandi inntriv verða gjørd í náttúruna fyri at draga fleiri vitjandi at og vaksa um inntøkuna. Umhvørvismálaráðið mælir til at leggja dent á hóskandi javnvág ímillum tað at varðveita náttúruna og tað at tryggja, at hon er atkomandi hjá øllum.

Verður loyvt at kapitalisera fagurvirðið og upplivingarvirðið í náttúruni við at selja sjálva atgongdina at uppliva náttúruna, kann tað vaksa ógvisliga um virðið á lendinum. Viðurkenna Føroyar mótsett øllum okkara grannalondum hetta, kunnu avmarkandi náttúruverndartiltøk koma landinum undir stóra endurgjaldsskyldu fyri mista innøku, og tað kann gerast munandi dýrari og truplari at fremja náttúruvernd í verki. Umhvørvismálaráðið mælir tí frá, beinleiðis ella óbeinleiðis, at gera sjálva náttúruna til søluvøru. Við at varðveita náttúruna sum felagstilfeingi kunnu almennu Føroyar tryggja, at náttúran verður atkomandi hjá øllum og varðveitt komandi ættarliðum.

Umhvørvismálaráðið mælir til at tryggja, at náttúrumyndugleikin verður tikin við upp á ráð, hvørja ferð metingar skulu gerast eftir lógini, sum hava við náttúruviðurskifti at gera. Umhvørvismálaráðið mælir somuleiðis til at umhugsa, um ikki onkrar kunngerðar- og góðkenningarheimildir áttu at ligið hjá náttúrumyndugleikanum, sum varðar av náttúruni.

Sambært náttúruverndarlógini, sum kom í gildi 1. januar í ár, kunnu ymisk verndartiltøk, eitt nú økisvernd og dýra- og plantuvernd, fremjast við kunngerð. Umhvørvismálaráðið mælir til at áseta í lógaruppskotinum, at kunngerðir, ferðavinnuætlanir, skilhaldsreglur o.a. sambært lógini altíð skulu vera í samsvari við verndartiltøk sambært náttúruverndarlógini, og at tær víkja fyri verndartiltøkum sambært náttúruverndarlógini, kemur ósamsvar fyri.

Umhvørvismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri